# Fróðskaparsetrið og Menasfrágreiðing í tingið

**Alt ruggar ikki rætt á Fróðskaparsetri Føroya. Ákærur móti stovninum eru so mikið álvarsligar, at Finnur Helmsdal, tingmaður vil hava landsstýrismannin Óla Holm at svara fleiri spurningum.**

FYRISPURNINGAR Á TINGI
*Jan Müller*

Finnur Helmsdal, tingmaður hjá Tjóðveldisflokkinum hevur sent Óla Holm, landsstýrismanni fleiri skrivliga spurningar um Fróðskaparsetur Føroyar. Spurningarnir eru hesir:

1.Hvørjar eru mannagongdirnar og siðvenjurnar í sambandi við doktaraheiti á Fróðskaparsetrinum?
2. Finst nakar útlendskur stovnur, sum eftirmetir og góðkennir vísindaliga arbeiði Fróðskaparsetursins?
3. Er tað rætt, at Søgu- og samfelagsdeildin er forsømd, er ov illa mannað og tí ikki megnar leiklut sín?
4. Er tað satt, at sáttmáli um vísindaliga arbeiðið í Menas málinum varð undirskrivað av oljufelag og útlendskari ráðgevandi fyritøku, uttan at Fróðskaparsetrið var vitandi um tað?
5. Hvør hevur skrivað ritverkið, sum í dag liggur á borðinum og er úrslitið av Menas verkætlanini?
6. Er tað rætt, at hetta ritverk- ella partar av tí - er á so lágum vísindaligum støði, at tað ikki er borðbart?
7. Um tað verður landsstýrismanninum greitt, at álvarsliga atfinningarsom viðurskifti valda ella fara fram á Fróðskaparsetrinum, hvat ætlar hann so at gera við tað?



*Finnur Helmsdal, tingmaður vil hava greiðu á ymsum viðurskiftum á Fróðskaparsetrinum.*

### Viðmerkingar

Í viðmerkingunum sigur tingmaðurin, tá hann seinastu tíðina beinleiðis eins og óbeinleiðis hevur fingið fleiri ábendingar um, at alt ikki er, sum tað skal vera á Fróðskaparsetrinum, kanska eina mest á Søgu- og samfelagsdeildini, hevur hann avgjørt at royna at fáa hesi viðurskifti fram í ljósmála. Hann sipar fyrst og fremst til tær, sum hann málber seg, rættiliga óinnballaðu ákærurnar mótvegis bæði deild og setri, sum fyrrverandi starvsfólk bar fram í útvarpinum herfyri.

Ákærur um, at vísindaliga støðið á Søgu- og samfelagsdeildini ikki røkkur upp um altjóða minstamarkið. Ákæra um, at sokallað vísindaligt ritverk, tilevnað í navni setursins, langt frá er vísindaliga borðbart uttan neyðturvilig dømi og uppseting av trupulleikum í eftirgjørd vísindalig og hugsað scenario. Sami persónur segði harafturat í ÚF, at sama ritverk er so tilforlátiligt, at sjálvt ein 1. g næmingur hevði klárað tað betur.

Finnur Helmsdal sigur seg harumframt hava fingið ein hóp av rættiliga greiðum ábendingum um nakað tað sama so nógva aðrastaðni frá. Ábendingar, sum sannføra hann um, at hetta er mál, ið hevur almenna viðgerð uppiborna. Ábendingar um, at málið eigur at verða viðgjørt av hægsta politiska myndugleika.

### Eingin sáttmáli

Tingmaðurin upplýsir, at kjarnin í hesum máli er eftir øllum at døma viðurskiftini kring eina avtalu millum Fróðskaparsetur Føroya og eina enska ráðgevandi fyritøku Menas. - BP Amoco skal eisini vera partur í málinum, tí tað eru teir, sum fíggja avtaluna. Avtalan snúði seg í stuttum um, at vísindalig lýsing av ymsum føroyskum viðurskiftum skuldi tilevnast í navni setursins. Og skiltu okkara fólk tað soleiðis, at arbeiðið eisini skuldi útinnast av føroyskum vísindafólki. Frá byrjan kendu føroysku vísindafólkini seg ørkymlað, høvdu eina kenslu av, at tey vóru sum slept upp á fjall. Arbeiðið var óskipað, kunningin lítil og eingin. Og hóast sáttmáli altíð verður skrivaður í sambandi við slíkar avtalur, kom ongantíð skil á hetta verður sagt í viðmerkingunum og tingmaðurin heldur fram:

- Síðan hava vit frætt, at sáttmáli er undirskrivaður. Men at hann er undirskrivaður av BP og ráðgevandi fyritøkuni Menas, uttan at Fróðskaparsetrið visti av ella varð spurt. Vit hava frætt, at leiðslan á setrinum varð varug við hetta, men gjørdi einki við tað. Tvs. at leiðslan læt sær lynda, at ein ráðgevandi fyritøka og eitt oljufelag skriva undir sáttmála sínámillum um vísindaligt arbeiði, sum føroysk vísindafólk skulu útinna. Er hald í hesum, hava vit ikki bara staðfest, at ein av røttum kann ivast í, hvør stýrir vísindaliga arbeiðinum í Føroyum. Vit hava somuleiðis staðfest, at leiðsla setursins hevur sera lítla virðing fyri Søgu- og samfelagsdeildini, fyri søguligari- og samfelagsligari gransking. Og tí spyr ein seg sjálvan og landsstýrismannin, um leiðslan á Fróðskaparsetrinum hevur so lítla virðing fyri Søgu- og samfelagsdeildini, at hon letur hana upp fyri skutil aftur fyri nakrar silvurdálar frá tilvildarligari útlendskari ráðgevandi fyritøku. Ella kann tað hugsast, at Søgu- og samfelagsdeildin er forsømd, at har ikki er nóg nógv skikkað fólk, og at hon tí ikki megnar sín leiklut. Er Menas málið kanska ein avleiðing av tí? Og er tað nakar stovnur uttan fyri Føroyar, sum eftirmetir og góðkennir tað vísindaliga arbeiði, ið gjørt verður á Fróðskaparsetrinum ella í samstarvi við stovnin? Vert er eisini at vita, hvørjar mannagongdirnar og siðvenjurnar eru í sambandi við t.d. doktaraheiti. Eru øll hesi viðurskiftini ikki í lagi, er vísindaliga arbeiði okkara bara lótir og kann ikki kallast gransking. Víðari kann ein so spyrja landsstýrismannin, um vísindaliga perspektivið hjá samgonguni ikki er hægri og røkkur longur enn so.



*Er tað upp til tjóðveldistingmannin Finn Helmsdal, so skulu viðurskiftini á Fróðskaparsetrinum kannast*

Finnur Helmsdal sigur seg víðari í viðmerkingunum hava frætt, at fíggjarligi ruðuleikin, sum hevur merkt verkætlanararbeiðið, er orsøk til, at eitt av vísindafólkunum nú hevur stevnt Fróðskaparsetrinum eftir fittari upphædd, sum viðkomandi sigur seg eiga til góðar fyri útint verkætlanararbeiði.

At enda leggur tingmaðurin stóran dent á týdningin, sum hann heldur gransking og vísindaligt arbeiði hevur fyri Føroyar. - Er tað nakað føroyska samfelagið hevur stóran tørv á, so er tað skikkað vísindaligt arbeiði, skikkaðari gransking. Innan øll samfelagsins viðurskifti. Vit ætla okkum at standa á egnum beinum, vit ætla at skipa samfelagið eftir egnum leisti. Í hesum sambandi eiga vit at minnast, at vitanin um okkara samfelag er avgerandi fyri, at rættar politiskar avgerðir verða tiknar. Sum sjálvstøðug tjóð koma vit í manga hólmgongu við aðrar tjóðir. Tað kann snúgva seg um ymisk rættindi, um sáttmálasamráðingar ella – trætur. Í hesum viðurskiftum er tað galdandi, at tann, sum hevur mest stringentu vísindaligu grundgevingarnar, hann vinnur sum oftast.

Til tess at fáa greiði á ikki bara Menas málinum, men eisini øðrum viðurskiftum á Fróðskaparsetrinum, setir tingmaðurin landsstýrismanninum omanfyri nevndu spurningar.

# Havnarmyndir í Smiðjuni

LISTAFRAMSÝNING
*Jan Müller*

Í dag klokkan 16 letur arkitekturin, listamaðurin og havnamaðurin Høgni W. Larsen upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Høgni hevur málað akvarellir í meira enn 30 ár, so hann er eingin ársungi innan hetta listaøkið. Hann hevur málað í Danmark, Svøríki og Finlandi og í stórbýum sum Paris, Rom og Venedig. Hann hevur áður havt framsýningar í Smiðjuni, í Listaskálanum og á Dimmalætting.

Tað, sum kanska ger júst hesa framsýningina serliga áhugaverda er, at allir málningarnir eru úr Havnini ella av havnagøtum. Sum arkitektur er Høgni mest kendur fyri at hava teknað og bygt Fríðrikskirkjuna á Nesi og at hava teknað og partvís smíðað alt sum í kirkjuni er líka frá stakum, lampum til altar og altartalvu.

Umleið helmingurin av málningunum er til sølu. Eisini eru mappur við myndum og teksti um gøturnar í Havnini til sølu.

Framsýningin í Smiðjuni verður opin til og við sunnudagin 10. februar. Opið er týsdag til fríggjadag frá kl. 17 til 20 og leygardag og sunnudag frá k.l. 14 til 19.



*Listamaðurin Høgni Larsen hevur framsýning í Smiðjuni í hesum døgum.*

*Mynd Álvur Haraldsen.*



# Fær álvarsliga átalu frá Løgtingsins Umboðsmanni

**Vinnumálastýrið breyt lógina, tá ið nýggjur Landsverkfrøðingur varð settur, eftir at Henning Jacobsen varð uppsagdur, sigur Løgtingsins Umboðsmaður**

ALMENN FYRISITING
*Áki Bertholdsen*

Vinnumálastýrið breyt fyrisitingarlógina, tá ið nýggjur landsverkfrøðingur varð settur, eftir at Henning Jacobsen varð sagdur úr starvi á jólum 1998.

Tað sigur Joen H. Andreasen, Løgtingsins Umboðsmaður.

Vinnumálastýrið fær tíkil eina "álvarasliga átalu", sum Umboðsmaðurin málber seg.

Tað var ein fyrrverandi starvsfelagi á Landsverkfrøðinginum, sum klagaði mannagongdina, tá ið Henning Jacobsen varð koyrdur frá sum Landsverkfrøðingur, fyri Løgtingsins Umboðsmanni.

Eftir lógini um kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um viðurskifti, sum stava frá tíðini fyri 1. jan. 2000 og sostatt ber tað ikki til hjá honum at viðgera spurningin um sjálva uppsøgnina, og tí er tann parturin av klaguni avvístur.

Hinvegin kann umboðsmaðurin viðgera spurningin um at Oyvindur Brimnes varð settur í starvið ístaðin fyri Henning Jacobsen, tí hetta var 22. mai 2000.

Umboðsmaðurin sigur, at av tí, at tað er ein uttanfyristandandi, sum hevur klagað, er Henning Jacobsen spurdur, um hann hevði nakað ímóti, at klagan varð tikin upp til viðgerðar og tað hevur hann góðtikið.

Løgtingsumboðsmaður nevnir ongi nøvn í sínari viðgerð av málinum. Hinvegin verður ein partur í málinum nevndur A og tað er ongin ivi um, at tað er Henning Jacobsen. Ein annar partur veðrur nevndur R og tað er Oyvindur Brimnes.



*Eftir lógini hevði Vinnumálastýrið skyldu til at geva Henning Jacobsen eina serliga gjølliga frágreiðing um, hví hann ikki fekk starvið sum Landsverkfrøðingur aftur. Men tað fekk hann ikki og tað heldur Løgtingsins Umboðsmaður vera sera átaluvert*

### Skulu seta best skikkaða

Løgtingsins Umboðsmaður sigur, at tá almennir myndugleikar skulu seta størv, hava teir skyldu til at seta best skikkaða umsøkjararan, og til at meta um hetta eiga teir at nýta øll viðkomandi, saklig og lóglig kriteriir.

– Tað er eingin grund til at ivast í, at setanarbólkurin, sum gjørdi tilmæli um at seta Landsverfrøðing, hevur gjørt sítt tilmæli eftir bestu sannføring.

Bólkurin er samdur um, at bæði Henning Jacobsen og Oyvindur Brimnes eru væl skikkaðir til at verða stjóri fyri landsverkfrøðingsstovnin. Bólkurin er eisini samdur um, at Henning Jacobsen hevur í verki hevur víst, at hann er førur fyri at stýra stovninum undir skiftandi umstøðum, og at tað kanska einamest er honum fyri at takka, at stovnurin hevur tann leiklut og tann bygnað, sum hann hevur í dag; men at hetta kanska eisini merkir, at hann er ikki ein, sum tekur stig til størri bygnaðarbroytingar.

Niðurstøðan hjá setanarbólkinum gjørdist, at tey bæði umboðini fyri landsverkfrøðingsstovnin vístu á Henning Jacobsen sum best skikkaðan til starvi, men bæði umboðini fyri Vinnumálastýrið hildu, at tveir aðrar umsøkjarar vóru betri skikkaðir enn Henning Jacobsen

Umboðsmaðurin heldur seg ikki til at meta um, antin viðurskiftini hava verið so ímillum Henning Jacobsen og Vinnumálastýrið/landsstýrismannin, at hann ikki var var rætti maðurin til starvið.

Tí hevur hann heldur ikki grundarlag fyri at finnast at sjálvari avgerðini um at seta Oyvind Brimnes í starvið, heldur enn Henn ing Jacobsen.

– Eg geri tí ikki meira við tann spurningin, sigur Umboðsmaðurin.

### Ein avgerð báðar vegir

Kortini hevur Umboðsmaðurin nakrar viðmerkingar um mannagongdina viðvíkjandi setanini.

– Eins og tað at seta ein persón í starv er ein avgerð, soleiðis sum fyrisitingarlógin skilir hetta hugtak, so er tað eisini ein avgerð ikki at seta ein persón í starv, sigur Umboðsmaðurin.

Hann sigur, at gongur ein avgerð, ið verður fráboðað skrivliga, ikki til fulnar partinum á møti, skulu, eftir fyrisitingarlógini, grundgevingar fyri avgerðini fylgja við.

Serliga í setanarmálum skal tað ásannast, at tað kann vera trupult at grundgeva fyri, hví tann og tann umsøkjarin ikki hevur fingið starv, og eigur at verða víst serligt fyrilit í slíkum førum. Ein óheppið orðað grundgeving kann gerast steinur oman á byrðu. Hinvegin krevur lógin, at ein grundgeving verður givin teimum umsøkjarum, sum fáa skrivliga fráboðan um, at teir ikki hava fingið starvið.

Allir teir vrakaðu umsøkjararnir áttu tí at fingið eina grundgeving .

Umboðsmaðurin heldur, at hetta ger seg serliga galdandi fyri Henning Jacobsen, sum hevði arbeitt hjá Landsverkfrøðinginum í 23 ár, harav 10 ár sum leiðari, og sum søkti starvið eftir áheitan frá starvsfólkunum á stovninum.

– Undir hesum umstøðum hevði Vinnumálastýrið skyldu til at geva honum eina sera gjølliga frágreiðing, og eina neyva grundgeving fyri, at hann ikki skuldi setast í tað starv, sum hann var sagdur úr við teirri grundgeving, at starvið skuldi leggjast niður, sigur Løgtingsins Umboðsmaður.

Tað var ikki fyrrenn 6. juni í 2000, at Henning Jacobsen og hinir vrakaðu umsøkjararnir, fingu boð um, at starvið var sett við øðrum umsøkjara, hóast avgerðin um at seta Oyvind Brimnes í starvið longu varð kunngjørd við tíðindaskrivi tann 22. mai í 2000, ella meira enn 14 dagar frammanundan.

– Hetta má í sjálvum sær vera roknað sum brot á góðan fyrisitingarsið.

Umboðsmaðurin sigur, at tað, sum verri er, er at skriv ið til vrakaðu umsøkjararnar als onga grundgeving hevur, hóast teir høvdu krav uppá eina slíka, og hvat Henningi Jacobsen viðvíkur, eina sera gjølliga grundgeving.

– Eg haldi hetta vera sera átaluvert, sigur Løgtings Umboðsmaður.

Hann sigur, at hóast vantandi grundgeving fyri eini fyrisitingarligari avgerð er eitt álvarsligt brek, sum í ávísum førum kann føra við sær, at avgerðin er ógyldug, heldur hann ikki, at hetta ger seg galdandi í einum føri sum hesum.

Sjálv avgerðin um at seta Oyvind Brimnes í starvið, krevur ikki nakra grundgeving mótvegis honum sjálvum.

– Sum nevnt frammanfyri er ikki grundarlag fyri at halda, at hann ikki var tann besti maðurin til starvið. Avgerðin um at seta hann í starvið kann tí ikki metast at hava verið ógyldug, sigur Løgtingsins Umboðsmaður.

Hann sigur tískil, at burtursæð frá, at hann gevur Vinnumálastýrinum eina álvarsliga átalu fyri vantandi grundgeving í skrivinum til teir umsøkjararnar, sum ikki vórðu settir í starvið, ger hann ikki meira við málið.

# Vágatunnilin kostar tíggju ferðir so nógv

**At kalla mannagongdina í sambandi við Undirsjóvartunnilin fyri rationalisering, ber illa til, heldur fyrrverandi Landsverkfrøðingurin, Henning Jacobsen**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Tað er ikki ofta, at fráfarni Landsverkfrøðingurin, Henning Jacobsen, hevur sagt sína meining um ætlanina at gera undirsjóvatunnil undir Vestmannasund.

Landsverkfrøåingurin slapp ikki at gera arbeiðið. Ístaðin varð alment partafelag stovnað, sum skuldi standa fyri arbeiðnum, sum síðani var boðið út.

Men í frágreiðing síni til Løgtingsins Umboðsmann í sambandi við klaguna um, at hann varð koyrdur frá sum Landsverkfrøðingur-og ikki fekk starvið aftur, hevur hann kortini nakrar fáar metingar um undirsjóvartunnilin

Í frágreiðingini til Løgtingsumboðsmann, sigur Henning Jacobsen:

Havi einaferð í sambandi við Vágatunnilin roynt at finna út av, hvat ið verður lagt í orðið rationalisering.

Landsvegakervið er 463 km til longdar herí 14 tunnlar (27km). Raksturin kostar einar 46 mió. kr um árið og verða her koyrdir umleið 140 mió. km hvørt ár. Kostnaðurin er sostatt 100.000 krónur fyri hvønn kilometur av vegi og 33 oyru fyri hvønn koyrdan km.

Fyri Vágatunnilin verður roknað við einum rakstrarkostnaði uppá 7 mió. kr um árið. Og tá ið longdin er 7 kilometrar, gevur hetta 1 mió. krónur fyri hvønn kilometur.

Við bummpengum er tað helst áleið at meta ferðsluna tey fyrstu árini til einar 600 bilar um samdøgurið. Tað vil siga, at her verða koyrdir um 1,5 millión ir kilometrar um árið, og er tá lætt at koma til, at hetta gevur ein rakstrarkostnað uppá 4,67 krónur fyri hvønn koyrdan kilometur.

– Á henda hátt verður eitt alment "vesin" skift út við eitt annað av sama slagi og vit fáa møguliga fleiri. Munurin er bara at hetta kostar 10 ferðir so nógv, sigur fyrrverandi Landsverkfrøðingurin.

– Grundgevingarnar kunnu verða so mangar, men at kalla tað rationalisering ber illa til, leggur hann afturat.



*Munurin er bara, at Vágatunnilin kostar 10 ferðir so nógv at reka sum Landsvegakervið annars, sigur fráfarni landsverkfrøðingirn, Henning Jacobsen*